# Virka sum »fjaldar« lønarhækkingar



*Og neyvan berjast áhugafeløg líka hart fyri sínum sjónarmiðum, um tey samstundis eru fíggjarliga heft, í ávísum førum at mótpartinum, skrivar Vinnuhúsið*

Fíggjarmálaráðharrin hevur avgjørt at rudda upp í fundarsamsýningunum innan nevndir og arbeiðsbólkar, sum tað almenna setur. Ein upprudding sum Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur fult undir við, skrivar Vinnuhúsið.

Meginreglan verður at almen starvsfólk ikki fáa fundarpening um talan er um nevndararbeiði, ið er partur av teirra vanliga arbeiðsøki. Hetta vil við øðrum orðum siga, at samsýning verður ikki givin, um almen starvsfólk sita í einari nevnd, sum umboð fyri arbeiðspláss sítt, ella sum málsviðgerði av málum, sum er arbeiðsøki hjá tí stovni, sum tey umboða.

Samstundis fáa umboð fyri áhugafeløg, fakfeløg ella aðrar áhugabólkar ikki samsýnig fyri at umboða sítt áhugafelag í nevndum ella arbeiðsbólkum.

**Ligið stillar**

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur fult undir við hesum sjónarmiðum.

Innan tað almenna hava nevndarsamsýningar í stóran mun virka sum »fjaldar« lønarhækkingar, og hetta heldur Arbeiðsgevarafelagið er óheppið. Somuleiðis átti tað at verði ein sjálvfylgja, at tá yrkis- ella fakfeløg ynskja ávirkan við at luttaka í nevndum, so er tað ikki ein uppgáva hjá tí almenna at gjalda fyri hetta.

Og neyvan berjast áhugafeløg líka hart fyri sínum sjónarmiðum, um tey samstundis eru fíggjarliga heft, í ávísum førum at mótpartinum.

Í hesum sambandi kann nevnast, at fleiri nevndir, sum tað almenna hevur sett, hava ligið stillar seinasta árið, tí fakfeløgini ikki hava viljað luttikið, tí at tey ikki fingu fundarsamsýning.

*Vilhelm Meyer Johannesen. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við at ruddað verður upp í almennum fundarsamsýningum*

# 140 við á oljuráðstevnu

*Tann 24. og 25. okt. verður oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum. Vinnuhúsið og Stephanssons Hús skipa fyri, skrivar Vinnuhúsið*

Endamálið við stevnuni er fyrst og fremst at fáa oljufeløgini at kunna føroysku vinnuna um ætlannir sínar í leitiskeiðnum, og hvussu tey ætlað at røkka málinum um størst møguliga føroyska vinnuluttøku.

Vinnuhúsið skipar fyri ráðstevnuni í samstarvi við Stephanssons Hús.

Nú freistin fyri tilmeldingin er farin sæst, at uml. 140 luttakarar verða á stevnuni, og av hesum eru 3/4 føroyingar og 1/4 útlendingar. Útlendsku umboðini eru frá oljufeløgum, nøkur almen umboð og nøkur umboð frá veitarafeløgum.

**Í so tíðliga**

Oljubólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði sjálvandi vónað, at fleiri útlendskir veitarar fóru at nýta høvi at koma hendanvegin, nú oljuleiting stendur fyri durum. Og tískil varð tíð avsett á skránna soleiðis, at stevnan eisini gav møguleikar hjá føroyskum feløgum at hitta hesar.

Ásannast má tó, at ráðstevnan kanska liggur í so tíðliga, og at nógvir útlendskir veitarar ikki enn hava tikið støðu til luttøku á føroyskum øki. Tó var valt at leggja hesa stevnuna nú, tí primera endamáli var, at føroysk vinna bleiv kunnað um ætlanirnar hjá oljufeløgunum, skrivar Vinnuhúsið.







Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820




# Landsstýrið kann venda sær til ST

*Serfrøðingur í altjóðarætt staðfestir fyri landsstýrinum, at Føroyar eru tjóð og hava rætt at venda sær til atjóða stovnar, uttan at spyrja seg fyri hjá donsku stjórnini*

John Johannessen

Danska stjórnin hevur, tá hon fór undir samráðingar við føroyingar um loysing, á ósagdan hátt viðurkent at Føroyar eru ein tjóð, sum hevur sjálvsavgerðarrætt.

Hetta staðfestir íslendski serfrøðingurin í atjóðarætti, Gundmundur Alfredsson, í einum uppriti, hann hevur gjørt fyri landsstýrið.

Uppritið er gørt, eftir at danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, fyri tíð síðani gjørdi ST greitt, at landsstýrið ikki hevur rætt at venda sær til atjóða felagsskapir uttan loyvi frá danska uttanríkisráðnum. Hetta gjørdi Niels Helveg Petersen í sambandi við, at landsstýrið spurdi seg fyri hjá ST, um at fáa ein óheftan triðja part upp í fullveldissamráðingarnar.

Sambært stýrisskipanarlógini eru pástandirnir hjá danska uttanríkisráðharranum rættir, men íslendski serfrøðingurin í altjóðarætti heldur støðuna vera eina aðra, tá danska stjórnin hevur góðtikið at samráðast við Føroyar um fullveldi.

– Tá ið danska stjórnin er farin undir at samráðast við føroyska landsstýrið um treytirnar fyri loysing, hevur hon í øllum førum á ein ósagdan ella undirskiltan hátt – og eg meti, at tað er beinleiðis – viðurkent, at føroyingar eru ein tjóð, sum hevur sjálvsavgerðarrætt. Tað skuldi verið greitt við atliti at teim framhaldandi samráðingunum, at spurningurin er ikki longur hvørt, men hvussu og nær, ið føroyingar vilja útinna sín sjálvsavgerðarrætt. Eins greitt er tað, at talan er um sjálvsavgerðarrætt í tí ytra týdninginum, nevniliga um rættin til loysing, sigur Gudmundur Alfredsson í uppritinum.

Landsstýrið fer nú at vísa altjóða stovnum á frágreiðingina hjá Alfredsson, men ætlanir eru ikki um at brúka hana móti donsku stjórnini.



*Torbjørn Jacobsen hevur tikið við einum sektaruppskoti á 7.000 krónur fyri at hava ábyrgdina av at Halgafelli fór á land*

# Tórbjørn fekk bót

*Landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen, tók leygardagin við einum sektaruppskoti á 7.000 krónur fyri at hava ábyrgdina av, at Halgafelli rendi á land og sakk í januar*

John Johannessen

Leygardagin tók Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, við einum sektaruppskoti á 7.000 krónur. Bótina fær hann fyri, at hann sum skipari hevði ábyrgdina av, at frystifarmaskipið, Halgafelli, sakk 11. januar.

Tað er enn ikki greitt, um hetta fer at fáa politiskar avleiðingar fyri landsstýrismannin. Tjóðveldisflokkurin fer í vikuni at viðgera málið og meta um, hvørt tað skal fáa nakrar politiskar avleiðingar.

Síðani tað kom fram, at Tórbjørn Jacobsen fór at verða ákærdur fyri brot á sjóreglurnar í sambandi við óhappið, hevur nógv verið kjakast um landsstýrismaðurin eigur at fara frá, orsakað av ákæruni ella ikki.

Á aðraru síðuni hava fólk víst á, at ein landsstýrismaður eigur at fara frá, tá hann er ákærdur fyri at hava brotið landsins lógir. Á hinari síðuni hava fólk sagt tað vera hysteriskt at krevja ein landsstýrismann frá, tí hann er ákærdur fyri at hava verið óskettin í einari keðiligari støðu.

Sambært teimum útsagnum, Tjóðveldisflokkurin higartil er komin við í málinum, kann ikki roknast við, at málið fer at fáa stórvegis politiskar avleiðingar fyri landsstýrismannin.

# Vil endurskoða Framtaksgrunnin

*Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum metir Framtaksgrunnin virka alt ov illa. Tí vil hann hava hann endurskoðaðan ella avtiknan*



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

John Johannessen

Fæst framtaksgrunnurin ikki at virka betur, er einasta loysnin at avtaka hann.

Hetta sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, í samrøðu við Dagblaðið, sum kom út í gjár.

Landsstýrismaðurin er vorðin serstakliga argur inn á Framtaksgrunnin efir at tað kom fram, at hann ikki vildi vera við at fíggja nýggja Hvivltenni hjá Kjartan Joensen.

Jørgen Niclasen átalaði herfyri í Degi og Viku Framtaksgrunnin fyri, at hann ikki vildi vera við í hesi verkætlan, sum ein royndur vinnulívsmaður stendur fyri.

– Ofta fái eg ta fatan, at einasta mál hjá grunninum var at bjarga Føroya Fiskavirking og Fiskasøluni, og at halda teimum á almennum hondum. Alt ov ofta síggja vit, at grunnurin noktar fyri at vera við í annars sera skilagóðum verkætlanum, og tað var í øllum førum ikki meiningin við Framtaksgrunninum, sigur Jørgen Niclasen við Dagblaðið.

Landsstýrismaðurin ásannar, at Framtaksgrunnurin kortini hevur verið við í onkrari hissini ætlan, men hevur kortini langt frá virkað sum ætlað.

– Listin yvir umsóknir, ið hava verið kveistraðar av borðinum, er nærum óendaligur, meðan játtanirnar nærum kunnu teljast á einari hond, sigur Jørgen Niclasen.

Tí heldur hann, at tað verður neyðugt at taka spurningin um framtíðina hjá Framtaksgrunninum upp til gjølliga viðgerð.





Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin

| | 4-koyggju kamar v. wc/bað | 2-koyggju kamar v. wc/bað | Luksus kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 3.640,- | 4.620,- | 6.940,- |
| Bilur + 3 fólk | 2.920,- | 3.660,- | |
| Bilur + 2 fólk | 2.210,- | 2.700,- | 3.860,- |

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðaríbúðir/Summarhús:
Danland í 1 viku úr 4.995,-
2 vaksin & 2 børn í bili
Dansk Folkeferie í 1 viku úr 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior - Keypmannahavn í 1 viku úr 3.795,-
fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum
Park Hotel - Ålborg í 1 viku úr 3.350,-

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com